VB-GÍ:

# Gøtumenn vilja venda gongdini

**Fýra ár á rað hevur GÍ vunnið í Vági, og hesaferð eru gestirnir eyka svangir. Hjá vágbingunum tykist størsti trupulleiki vera krímið, sum ger um seg**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Einki stig eftir trimum umførum er ikki gerandiskostur í Gøtu. Men tað er kaldi veruleiki í dag. Ein veruleiki, sum gøtumenn tó vóna at broyta sunnudagin.

- Í fjør gekk í øllum førum væl hjá okkum, so eg vóni, at vit kunnu venda gongdini nú, staðfestir Súni Olsen.

Og hagtølini siga eisini, at Súni hevur nakað at hava vónina í. Seinastu fýra ferðirnar hevur GÍ nevnliga fingið fult í Vági.

Einasta fráveran hjá GÍ tykist vera Kaj Ennigarð, sum fekk reytt kort í dystinum móti KÍ.

**Sjúkir vágbingar**

Hjá VB tykist størstu trupulleikin at vera, hvussu teir skulu basa kríminum, sum tykist herja landið.

Tá vit seinast høvdu samband við VB, vóru fýra mans seingjarliggjandi, men vónin var sjálvandi, at hesir fóru at koma fyri seg undan sunnudegnum.

Í aðrar mátar eru hvørki skaðar ella leikbann, sum hótta liðið.

KÍ-Skála:

# Skála bíðar eftir fyrsta sigrinum í Klaksvík

**Í Klaksvík siga teir fótbóltslagið vera gott, og teir vóna, at tað skal eydnast betri hesa ferð á heimavølli, enn tað gjørdi síðst**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Lagið undir venjingunum hevur verið gott, verður sagt úr Klaksvík, har teir í vikuni fingu boð um, at teir ikki sleppa at halda fram í steypakappingini. Venjarin og spælarnir hava gjørt nógv fyri at hetta ikki skal órógva fokusið, sum teir hava á stóru uppgávuna, sum er á skránni sunnudagin, tá ið skálamenn koma at vitja.

Leon Bjartalíð hevði fingið skaða í fótin, tá ið hann sunnudagin varð skiftur út í Gøtu. Hann hevur ikki vant í hesi vikuni, og tí verður hann ikki millum teir fyrstu ellivu í morgin. Jan Andreasen varð skiftur inná vongverjan í Gøtu. Í hesi vikuni hevur hann vant meiri, enn hann hevur gjørt higartil í ár, og tí er eingin ivi um, at hann verður á liðnum. Arnhold Joensen var sjúkur síðsta sunnudag. Hann var ikki aftur til venjingar fyrrenn hóskvøldið. Tí er eingin ivi um, at tað verður Kristoffur Jacobsen, sum sunnudagin fyri fyrstu ferð var millum teir fyrstu ellivu, ið verður á miðvøllinum í høgru, og harvið fyri fyrstu ferð á heimavølli fer at fáa møguleikan millum teir fyrstu ellivu.

Klaksvíkingar vóru væl nøgdir við úrtøkuna í Gøtu, men teir ásanna samstundis, at tað hevur verið og verður trupult at fáa fult á heimavølli, og teir ætla sær meiri hesa ferð, enn teir fingu, tá ið VB vitjaði.

**Bíða eftir fyrsta sigrinum**

Á Skála eru einki nýtt at frætta, og tað harmast teir um. Teir tríggir útlendingarnir bíðaðu í gjár framvegis eftir spæliloyvunum. Teir roknaðu ikki við, at loyvini fóru at koma í rættlag undan vikuskiftinum, men samstundis halda teir seg hava orsøk at vóna, at viðurskiftini fara at koma upp á pláss í næstu viku.

Skálamenn hava somu manning sum seinast, tá ið teir fara til Klaksvíkar. Eftir javnleikin ímóti ÍF iðra teir seg um, at teir misnýttu fleiri upplagdar møguleikar. Í Klaksvík hava teir ongantíð vunnið. Tvær ferðir hava teir tapt, og í fjør var úrslitið 1-1, eftir at Skála leingi hevði verið á odda og eftir at teir høvdu havt fleiri stórar møguleikar at økja um 1-0 leiðsluna. Sunnudagin sóu skálamenn ein part av GÍ-KÍ, men teir halda, at umstøðurnar vóru orsøk til, at teir ikki gjørdust so nógv klókari upp á KÍ.

HB-TB:

# Trýst á meistarunum

**Í HB hava tey longu tapt tvær ferðir, og tað setir krøv, nú liðið hevur heimadyst móti uppflytarunum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at HB er favorittur, nú teir sunnudagin skulu taka ímóti TB í Gundadali, men samstundis leggur favoritt-leikluturin eitt stórt trýst á HB-hópin. Trý stig í trimum dystum er í øllum førum ikki meistaraspæl.

Men hóast hetta, so heldur Hallur Danielsen í HB ikki, at talan er um nakað eyka trýst á liðið.

- Tað haldi eg ikki, at tú kanst siga. Men eftirverandi dystirnir eru sjálvandi við at fækka í tali, og tað er so eingin loyna, at vit ætla okkum trý stig. Eisini hava vit ein keðiligan dyst í Vági, sum vit vilja rysta av okkum. Og okkara ætlan er so, at tað skal ganga út yvir TB. Men tað hava teir so helst eina aðra fatan av, so vit fáa at síggja, sigur hann.

Hjá HB er støðan við fólki óbroytt í mun til seinastu dystirnar. Tað vil siga, at Vagnur Mohr Mortensen og Heine Fernandez framvegis eru úti við skaða, men at restin av hópinum er til reiðar.

**Hugagóðir tvørámenn**

Á Tvøroyri er lagið heilt gott. Hóast einki stig enn er fingið til høldar, so hevur talan verið um góð avrik, har talan eins væl kundi verið um sigrar.

- Vit hava í øllum førum fingið rættað upp á nøkur ting. Ikki minst hava vit fingið verjupartin upp á pláss, og tað frøast vit um, staðfestir Jón Johannesen.

Hann ásannar tó eisini, at talan er um trupla uppgávu, nú teir meistararnar á útivølli, men fyri tað er so einki avskriva undan dystinum.

- At spæla móti HB er altíð nakað, sum setur okkum upp, og hartil halda vit eisini, at vit hava nakað at prógva. Ikki minst eftir tær viðmerkingarnar, sum hava verið í pørtum av fjølmiðlunum. Har ætla vit í øllum førum at prógva, at viðmerkingarnar eru farnir skeivur staðfestir Jón.

Hjá TB tykist støðan við fólki vera eitt sindur ivasom. Tað er tó greitt, at Predrag Zivkovic er leikbannaður, og at hann tí ikki fær verið við. Alexandar Jovevic fór út við skaða móti NSÍ, og óvíst er, um hann er tøkur. Somuleiðis er óvíst, um Emmanuel Larbi er tøkur aftur, eftir at hann hevur drigist við skaða.

**formuladeildin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 3 | 2 - 1 - 0 | 8 | 6 | 2 | 7 |
| 2 KÍ | 3 | 2 - 1 - 0 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 3 Skála | 3 | 1 - 2 - 0 | 8 | 4 | 4 | 5 |
| 4 NSÍ | 3 | 1 - 1 - 1 | 3 | 3 | 0 | 4 |
| 5 VB | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 6 EB/Streymur | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 7 B36 | 3 | 1 - 1 - 1 | 1 | 1 | 0 | 4 |
| 8 HB | 3 | 1 - 0 - 2 | 5 | 6 | -1 | 3 |
| 9 TB | 3 | 0 - 2 - 1 | 2 | 6 | -4 | 2 |
| 10 GÍ | 3 | 0 - 0 - 3 | 5 | 8 | -3 | 0 |

# Hagtølini

Gøtumenn hava hagtølini við sær, nú teir í fjórðu royndini gera eina roynd at koma á talvuna. Seinastu mongu árini hevur GÍ havt gott tak á í Vági, og fýra ár á rað hava teir gulu enntá tikið alt við sær av Eiðinum.

Hagtølini siga okkum eisini, at HB hevur havt ruddliga yvirvág móti TB, meðan ÍF ikki hevur vunnið á B36 í Fuglafirði seinastu tíggju árini, tó at tað mangan hevur gingið javnt á.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðulini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

**-jm**

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-Skála | 1-1 | 7-0 | 4-0 | - | - | - | - | - | - | - | 2-1-0 | 12-1 |
| HB-TB | - | - | 9-3 | - | - | - | 4-3 | - | 7-1 | 4-1 | 4-0-0 | 24-8 |
| VB-GÍ | 2-4 | 0-3 | 1-2 | 1-2 | 5-3 | 1-3 | 3-1 | 0-0 | 0-4 | 0-2 | 2-1-7 | 13-24 |
| EB/S-NSÍ | 2-0 | 1-1 | 1-2 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 2-1-1 | 5-3 |
| ÍF-B36 | 2-2 | - | - | - | - | 1-4 | 0-0 | 1-2 | 1-1 | - | 0-3-2 | 5-9 |